Viðgerðartestamenti

Eg vil ikki hava lívsleingjandi viðgerð, harundir uppafturlíving í sambandi við hjartasteðg:

☐ Um eg liggi fyri deyðanum
(tvs. at einasta viðgerð, ið verður givin, er linnandi viðgerð).

☐ Um eg eri hjálparleys/-ur orsakað av sjúku, vanlukku v.m., og ongi tekin eru um, at eg fari at koma fyri meg.

Mítt ynski skal bert eftirlíkast:

- ☐ Um míni nærmastu avvarðandi góðkenna hetta í ítøkiligu støðuni.
- ☐ Um mín verji góðkennir hetta í ítøkiligu støðuni.
- ☐ Um tann, sum eg havi givið framtíðarfulltrú, góðkennir hetta í ítøkiligu støðuni.

☐ Um lívsleingjandi viðgerð, harundir uppafturlíving í sambandi við hjartasteðg, kann viðføra, at eg yvirlivi, men at tey kropsligu árinini av míni sjúku ella viðgerð verða mett at vera sera álvarsom og pínufull.

Mítt ynski skal bert eftirlíkast:

- ☐ Um míni nærmastu avvarðandi góðkenna hetta í ítøkiligu støðuni.
- ☐ Um mín verji góðkennir hetta í ítøkiligu støðuni.
- ☐ Um tann, sum eg havi givið framtíðarfulltrú, góðkennir hetta í ítøkiligu støðuni.

P-tal ☐☐☐☐☐☐-☐☐☐

Navn _____

Bústaður _____

Postnr./býur/bygd _____

_____
Dagfesting

_____
Undirskrift

Samband

Um tú hevur spurningar um tað, sum er í hesum oyðublaði, kanst tú venda tær til tín kommunulækna ella til Heilsustýrið.

Heilsustýrið
Óðinshædd 11, 1. hædd hm.
FO-100 Tórshavn
(+298) 30 90 60
hst@hst.fo
hst.fo

Heilsustýrið

heilsutrygd
heilsutrygd.fo

AnniJanni

Viðgerðar-testamenti

Ein góður endi á lívinum

Heilsustýrið

Viðgerðartestamenti

Um tú kemur í eina støðu, har tú ikki sjálv/-ur kanst siga frá, ber til at gera av frammanundan, um tú ikki vilt fáa lívsleingjandi viðgerð og uppafturlíving. Fyri at skráseta hetta, er neyðugt, at tú gert eitt viðgerðartestamenti.

Ein treyt fyri at gera eitt viðgerðartestamenti er, at tú ert fylt/-ur 18 ár. Eisini er tað ein treyt, at tú kanst ansa tær sjálvum/sjálvari og skilir avleiðingarnar av tínari avgerð.

Nær fær eitt viðgerðartestamenti gildi?

Um tú ikki longur er før/-ur fyri at taka støðu til viðgerð, kann títt viðgerðartestamenti fáa gildi. Hetta kann t.d. vera, um tú ert vorðin minnisveik/-ur ella hevur verið fyri einari vanlukku. Tað er tó altíð ein læknalig meting, nær tú ert í einari støðu, har viðgerðartestamentið fær gildi.

Um tú ikki gert eitt viðgerðartestamenti

Um tú ert so mikið viknað/-ur, at tú ikki kanst ansa tær sjálvum/sjálvari, og tú ikki hevur gjørt eitt viðgerðartestamenti, royna læknarnir sum útgangsstøði at halda teg á lívi.

Hvør eigur at fáa fráboðan um títt viðgerðartestamenti?

Tað er eitt gott hugskot at tosa við tíni nærmastu avvarðandi, um tú hevur ávís ynski og hugsanir í sambandi við viðgerðartestamentið. Tað er eisini eitt gott hugskot at tosa við tín kommunulækna um hetta.

Tín avgerð

Heilsustarvsfólk skulu virða tað, sum tú hevur tikið avgerð um í viðgerðartestamentinum.

Tú kanst velja, at tær avgerðir, ið tú hevur tikið, bert eru galdandi, um tíni nærmastu avvarðandi, tín verji ella ein framtíðarfulltrúi góðkennir hetta.

Ein framtíðarfulltrúi er ein persónur, sum tú frammanundan hevur tilnevnt at taka avgerðir tína vegna, um tú ikki longur ert før/-ur fyri hesum.

Hvat kann eg siga nei til?

Í einum viðgerðarstestamenti kanst tú gera greitt, at tú ikki vilt fáa lívsleingjandi viðgerð, harundir uppafturlíving í sambandi við hjartasteðg, í hesum trimum støðunum:

- um tú liggur fyri deyðanum, og viðgerðin bert fer at leingja um lívið og ikki bøta um tína heilsustøðu ella geva tær pínulinnan.
- Um tú ert so mikið viknað/-ur av sjúku, vanlukku ella elli, at tú ongantíð aftur kanst ansa tær sjálvum/sjálvari – hvørki kropsliga ella sálarliga.
- Um viðgerðin kann gera, at tú yvirlivir, men læknin metir, at tey kropsligu árinini av sjúkuni ella av sjálvari viðgerðini verða sera álvarssom og pínufull.

Soleiðis gert tú eitt viðgerðartestamenti

Tú kanst gera títt viðgerðartestamenti hjá einum lækna í føroyska heilsuverkinum.

Tú kanst eisini taka aftur ella broyta títt viðgerðartestamenti við at venda tær til ein lækna í føroyska heilsuverkinum.

Tá ið tú skalt gera eitt viðgerðartestamenti, skalt tú brúka oyðublaðið, ið er á baksíðuni av hesum faldara. Set ein kross í puntin fyri tær ásetingarnar, ið tú vilt hava galdandi. Skriva p-tal, navn og bústað og undirskriva oyðublaðið.

Undirskrivaða oyðublaðið skal latast lækna í føroyska heilsuverkinum. Læknin skrásetir oyðublaðið í talgildu heilsuskipanini.